# Grundarsteinur: Tilfeingi

**Strategibólkurin hevur orðað hetta mál um tilfeingi Føroya:**

**Í 2015 geva tilfeingisvinnurnar ein so góðan og støðugan samfelagsbúskaparligan vinning, sum til ber.**

**Tilfeingið er landsins ogn og verður umsitið av Føroya landsstýri.**

Vinnan og vinnuskipanin eru bygdar á hesar setningar:

1. Framleidnið (framleiðsluorkan) í tilfeingisvinnum skal vera so stórt, sum til ber.
2. Búskaparliga yvirskotið í tilfeingisvinnum skal vera sum mest, og landinum verður tryggjað eina so góða tilfeingisinntøku, sum til ber.
3. Tilfeingið skal verða umsitið soleiðis, at vit varðveita endurnýggjandi tilfeingið og skaða umhvørvið sum minst.

Í 2015 er vinnuraksturin í tilfeingisvinnunum eyðkendur av fríari kapping, og hann er leysur av almennum forðingum fyri handli, íløgum og rakstrarhátti, uttan tá ið ræður um umhvørvisatlit.

Í 2015 vera rakstraravgerðirnar hjá teimum vinnurekandi avgerandi fyri úrslitið og eru leysar av almennum forðingum.

Í 2015 er øll tann *dagliga* umsitingin av tilfeinginum ópolitisk.

Í 2015 er komið á mál við reguleringini av tilfeingisvinnunum, so til ber hjá vinnurekandi at leggja varandi ætlanir.

## Soleiðis røkka vit málinum

### 2. Allýsingar

### Støðugan, samfelagsbúskaparligan vinning

Hvat merkir tað?

Myndugleikin førir ein politikk, sum tryggjar, at monopolstøður ella vardar serstøður hjá virkjum ella avmarkaðum bólkum ikki verða natúrligir partar av vinnuskipan okkara. Hetta

verður tryggjað við lógarverki, ið skal skapa eina spjaðing av vinnuvirkseminum og geva nýggjum luttakarum so góða atgongd, sum til ber.

Rætturin til gagnnýtslu verður skipaður í loyvum, ið eru landsins ogn. Hesi verða tó latin áhugaðum í tíðaravmarkað skeið á einum skipaðum marknaði, har landið er seljari. Landið hevur skyldu at bera so í bandi, at inntøkur landskassans vera tær røttu, samstundis sum skipanin við loyvissølu tryggjar eitt kappingarført og mennandi vinnulív.

Eitt lógarverk eigur at tryggja, at javnvág verður ímillum frælsið hjá vinnuni at seta saman vinnutólið og tey áhaldandi krøvini um at styrkja framleidnið (produktivitetin). Hetta merkir til dømis, at rúm skal vera fyri at skipa vinnuna í stórar eindir – um vinnan ynskir tað – men samstundis skal slík skipan ikki darva fríari kapping og sjálvsøgdum krøvum um at styrkja framleidnið.

### Tilfeingið er landsins ogn og verður umsitið av Føroya landsstýri

Henda áseting skal setast í lógina orðarætt. Tað merkir, at núverandi orðing "fólksins ogn" verður strikað. Orðingin "fólksins ogn" hevur mangan nervað almenna kjakið, og onkuntíð hevur spurnartekn verið sett við, um tað almenna hevur fríar heimildir at handla og taka avgerðir viðvíkjandi tilfeinginum, grundað á hesa orðing. Hesin ivi verður burtur, um orðingin verður broytt, sum omanfyri nevnt.

# 3. Fiskastovnar og fiskivinna

## 3.1. Framleidnið í fiskivinnuni skal vera so stórt, sum til ber

**Framleiðslan verður tó grundað á fáar eindir.**

Seinni parturin av hesum setningum er ikki nakað endamál í sjálvum sær, men er ein fyritreyt, ið fiskivinnan má halda seg til, og sum eitt og hvørt mál verður treytað av. Hetta verður helst galdandi fyri aðrar tilfeingisvinnur eisini. Harafturat mega politisku málini eisini lagast soleiðis, at góðir møguleikar verða at grunda eina samlaða vinnu og vinnuskipan á fáar eindir.

Orðingin "fáar eindir" fevnir um bæði fólk, feløg og vinnutól.

Vinnubýtið í einum ídnaðarsamfelagi er ofta tríbýtt:

- Tænastuvinnur
- Framleiðsluvinnur
- Tilfeingisvinnur

Gongdin í hesum vinnum tey seinastu mongu árini hevur verið, at talið á fólki í tænastuvinnum økist støðugt, samstundis sum alt færri arbeiða í framleiðsluvinnum og serstakliga í tilfeingisvinnum. Tað er okkara sannføring, at í framtíðini fer hesin munur alsamt at økjast, við tí úrsliti, at sera stórur partur av samlaðu arbeiðsmegini starvast í tænastuvinnunum, samstundis sum framleiðsluvinnur og tilfeingisvinnur fáa ilt við at skaffa fólk.

Okkara uppskot er tí, at politiski myndugleikin setir í verk tiltøk, ið leggja upp fyri hesum veruleika, og sum m.a. taka burtur allar forðingar fyri smidligari tillaging á økinum.

Í fiskivinnupolitikkinum og lógarverkinum hevur *spjaðing* av virkseminum verið ein avgerandi og týðandi táttur seinastu mongu árini. Lógin um vinnuligan fiskiskap staðfestir eisini í innleiðsluni, at umsitingin av vinnuni skal tryggja støðugar arbeiðsmøguleikar og virksemi um *alt* landið. Tískil heldur strategibólkurin, at allar slíkar orðingar skulu burtur úr vinnupolitikkinum. Tað er sannføring okkara, at fremsta uppgávan hjá tilfeingisvinnunum er ikki longur at skapa arbeiðspláss, ei heldur at spjaða arbeiðsskapandi virksemi kring landið.

Dagsins fiskivinnulóggáva kann sigast at vera tvíbýtt við atliti at veiðu:

1. Fiskidagaskipan
2. Kvotuskipan

Veiðitrýstið í fiskidagaskipanini verður stýrt við at regulera stødd á skipum, maskinorku og dagatali. Strategibólkurin heldur, at henda skipan lættliga kann tarna tøkniligari menning, tí tað verður ikki hildið at vera rætt, at politiski myndugleikin ger serstakar reglur fyri, hvussu stór skip skulu vera. Hesum spurningi skal vinnan fult og heilt taka sær av, og tískil er strategibólkurin sannførdur um, at forðingar fyri hesum eiga at vera burturtiknar, har til ber. Vit eru tó eisini sannførd um, at neyðugt er at stýra veiðitrýstinum, og broytingar í støddini á skipaflotanum skulu ikki føra til vantandi stýring av veiðitrýstinum. Samanumtikið kann sigast, at skjót, tøknilig menning er alneyðug fyri at kunna røkka málinum um gott framleidni fyri hvørja eind og fyri at kunna laga seg til avmarkaða arbeiðsmegi og arbeiðsorku.

Núverandi fiskivinnulóggáva hevur staðfestingar um framleiðslu av fiskavørum og *framleiðslustaði,* nevniliga at øll fiskavirking í Føroyum skal vera á landi. Strategibólkurin heldur, at tað er í andsøgn við fíggjarliga endamálið at lóggeva alla fiskavirking á ávíst stað, tá ið vit samstundis vita, at sama stað hevur trupulleikar við tilgongd av starvsfólki, framleiðsluorku og harvið evnunum at skapa fíggjarligt avlop og meirvirði. Tí verður mælt til at taka upp spurningin um at virka vørur, har fíggjarliga úrslitið er best.

Ein týðandi táttur í dagsins lóggávu er at tryggja eina spjaðing av veiðimynstri og innsatsi. Strategibólkurin ásannar, at myndugleikin skal vera sera varin við slíkum politikki, tí hann kann skjótt standa í andsøgn við fría tillaging hjá flotanum og ikki minst í andsøgn við tað at gagnnýta framleiðsluorkuna. Mett verður, at núverandi skipan beinleiðis eggjar til stórt tal av smáum eindum (skipum), ið ikki fáa gagnnýtt samlaðu orkuna til fulnar, tí somu skip kunnu ikki flyta millum ymisk virkisøki. Strategibólkurin heldur, at skipanin við skipabólkum skal endurskoðast við tí í hyggju at gera flytingar millum vinnuøkini smidligari, so til ber at gagnnýta orkuna í flotanum betur. Tá ið tosað verður um vinnuøki, meinast við, at hvør skipabólkur er eitt øki, eins og virksemið uttan fyri føroyskan sjógv er annað vinnuøki.

Eitt av sjónligastu dømunum um spjaðing og smáar eindir er skipanin við útróðrarflotanum. Dagsins skipan er grundað á, at søguliga hava nógvir útróðrarbátar verið í Føroyum, og at hesir hava havt eitt vánaligt framleidni samanlagt. Tískil hevur verið mett, at teir á ongan hátt kunnu ávirka støddina á einum fiskastovni. Ein onnur orsøk til nevndu fatan er, at útróðrarflotin mangan verður tulkaður sum ein siðsøguligur og mentanarligur partur av føroyskum fiskiskapi, og at hann ikki er at skilja sum ein búskaparlig eind. Strategibólkurin metir, at henda hugsan er beinleiðis skeiv, tá ið grundað verður á støðuna í 2006. Spurningurin um tal á bátum skal ikki vera avgerandi. Heldur skulu vit hugsa um, hvussu samlaði útróðrarflotin verður skipaður fyri at geva eitt so gott samlað úrslit, sum til ber. Útróður til ítrivs skal altíð verða skipaður fyri seg og eigur ikki at verða knýttur at vinnuligum útróðri.

Sum kunnugt er virksemið uttan fyri føroyskt sjóøki allýst sum serstakt virkisøki. Strategibólkurin heldur, at reglurnar um føroysk skip og føroyskt flagg skulu geva so góðar møguleikar fyri flytingum av fiskiførum, sum til ber, tí hetta fer at stuðla upp undir at gagnnýta tøku fiskiorkuna betur. Bólkurin sær ongar trupulleikar í, at fiskifar er í føroyskari fiskidagaskipan ella kvotuskipan ein part av árinum og troytir aðrar møguleikar hin partin.

Samanumtikið verður mælt til at seta hesi tiltøk í verk við atliti at framleidni og størri eindum:

- Kravið í lógini um vinnuligan fiskiskap, at virksemi skal vera um alt landið, verður burturtikið.
- Almenna kravið um, at tilfeingisvinnur í fyrstu atløgu skulu vera arbeiðsskapandi, verður burturtikið.
- Flotin skal hava nógv betri umstøður til tøkniliga tillaging enn í dag, og avmarkandi krav til stødd á fiskiskipum skal strikast.
- Í síni heild hevur fiskivinnan betri møguleikar at tillaga seg við atliti at framleiðslu og meirgóðsking.
- Krøv, ið forða fyri at flyta fiskifør millum vinnuøki, verða endurskoðað og burturtikin, har til ber.
- Føroyski útróðrarflotin skal býtast í tveir partar - ein vinnuligan part og ein, ið grundar sítt virksemi á ítriv.
- Krøv, ið forða fyri flyting av veiðiorku til og úr "føroyskum" vinnuøki, verða endurskoðað og burturtikin, har til ber.

## 3.2. Búskaparliga yvirskotið í fiskivinnuni skal vera sum mest, og landinum verður tryggjað eina so góða tilfeingisinntøku, sum til ber

Ein varandi trupulleiki í tilfeingisvinnu okkara hevur verið, at ov nógv framleiðsluorka hevur verið nýtt í mun til samlaða framleiðsluvirðið. Úrslitið hevur verið ein sera stórur framleiðslukostnaður, ið hevur havt við sær, at vinnan ikki hevur skapt positiva tilfeingisrentu.

Tí eiga myndugleikin og vinnan í felag at reisa spurningin um, hvørt tað er rætt, at ein vinna alsamt hevur negativa tilfeingisrentu, samstundis sum sóknast skal verða eftir, hvørji tiltøk kunnu setast í verk fyri at venda gongdini.
Myndugleikin skal tryggja, at øll tiltøk, sum føra til ovnýtslu av framleiðsluorkuni, verða sett úr gildi. Best kenda dømi um hetta eru allar tær beinleiðis studningsskipanir, ið verið hava seinastu árini. Hesar eiga nú at minka so líðandi, so at føroyska fiskivinnan gerst alt studningsfríari komandi árini. Hetta fer at hava við sær, at í 2015 hevur vinnan gjørt neyðugu tillagingarnar til at kunna virka væl sum studningsfrí vinna.

Samanlagt fer henda tillaging at gera, at lutfallið millum framleiðsluorku og framleiðsluvirðið verður betri, og harvið er møguleikin fyri positivari tilfeingisrentu skaptur.

At taka burtur studningsskipanir er tó ikki nóg mikið til at fáa røttu nýtsluna av fiskiorku.

Ein av størstu trupulleikunum við at allýsa fiskiorkuna og kostnaðin annars er tann afturvendandi ósemjan millum granskarar, myndugleikar og vinnubólkar um, hvussu nógv kemur undan fiskastovnum okkara, og hvussu nógv skal verða veitt. Tískil verður alneyðugt at seta í verk tiltøk, ið skulu betra um *felags* vitanarstøðið við atliti at, hvussu nógv kemur undan fiskastovnum okkara, og hvussu vit fáa sum mest burtur úr fiski- og framleiðsluorkuni. Ítøkiliga skal munandi meiri orka setast av til fiskirannsóknir og gransking, soleiðis at trúvirðið til slíkt tilfar verður so gott, sum til ber, samstundis sum vit fáa fullfíggjað tilfar um, hvussu nógv kemur undan fiskastovnunum. Skotið verður upp, at Føroyar ráða yvir trimum nýggjum fiskirannsóknarskipum í 2015, og at samlaða arbeiðsorkan til fiskirannsóknir og gransking er tríggjar ferðir størri enn í dag.

Framtíðar lógarverkið skal eisini tryggja, at fiskiskip verða nógv størri partur av fiskirannsókum enn nú. Hetta verður millum annað gjørt við at arbeiða fyri, at fiskiskip fáa til vegar útgerð og orku, so at rannsóknararbeiði og gransking gerast natúrligir partar av vanligum fiskiskapi. Upplýsingar, sum í dag verða latnar myndugleikanum í sambandi við eftirlit, verða mentar og meira útgreinaðar í framtíðini, samstundis sum tær eisini verða beinleiðis grundarlag undir rannsóknararbeiði.

Strategibólkurin metir, at tað er sera týdningarmikið, at serstakliga vinnan sær tað neyðuga í hesum og er við til at fíggja gransking og rannsóknararbeiði, soleiðis at fíggingin ikki bert verður ein almenn uppgáva, men eisini ein uppgáva hjá vinnuni.

Endamálið við nevndu tiltøkum er, at áðurnevndu partar, t.e. granskarar, myndugleikar og vinnubólkar, fáa eina felags fatan av, hvussu nógv kemur undan fiskastovnum okkara. Ein slík felags fatan fer í sjálvum sær at tryggja eina góða tillaging av samlaðu kostnaðunum og eina størri tilvitan um samlaðu kostnaðirnar í vinnuni. Harvið verður eisini grundarlagið undir positivari tilfeingisrentu betri.

Fiskirannsóknir og onnur gransking hava eisini avgerandi týdning í altjóða arbeiðinum at grundgeva fyri ognarrætti til tilfeingi. Føroyar eru tulkaðar sum strandarland og eiga part av felags fiskastovnunum í Norðuratlantshavi. Støddin á føroyska partinum verður tí avgjørd við hjálp frá gransking og rannsóknum. Eitt mennandi arbeiði á hesum øki verður tí ein fyritreyt fyri at økja ella verja føroyska partin av felags fiskastovnunum.

Í mong ár hevur ein týðandi liður í førda fiskivinnupolitikkinum verið at avmarka talið á fiskiloyvum, samstundins sum hesi áhaldandi hava verið lutað somu vinnufeløgum. Vansin við slíkari skipan er, at hon *avmarkar atgongdina* til vinnuna, soleiðis at nýtt fólk hevur ilt við at sleppa framat. Tá ið samanum kemur, verður úrslitið, at eigarar kunnu verða “vardir,” so at tann støðuga tillagingin, ið hevur við sær lækkandi kostnað, gongur seint ella í versta føri steðgar upp. Framtíðar fiskivinnulóggávan skal byrgja fyri hesi støðu, so at lættari verður hjá øllum at sleppa fram at fiskirættindunum. Hetta verður gjørt við at selja fiskirættindi regluliga og við at skipa sølurnar soleiðis, at ognarrætturin varir bert í ávísa tíð. Í hesum máli er sera týdningarmikið at finna eina javnvág millum frælsa atgongd og møguleikan hjá vinnuni at gera langtíðarætlanir. Eitt ítøkiligt dømi um slíkt uppskot kundi verið, at rættindi verða latin eitt ávíst áramál í senn, men at ein ávísur partur av hesum rættindum skal verða latin landinum aftur hvørt ár. Landið setur síðan henda sama partin til sølu, og hann kann keypast av antin teimum somu, sum lótu hann inn, ella av øðrum. Hetta merkir, at skal eitt felag halda síni rættindi viðlíka, verður neyðugt at keypa øll rættindini leypandi. Inntøkan av hesum handli er tilfeingisgjaldið til landið.

Øll fiskirættindini skulu bjóðast út í almennari sølu, t.e. at øll skula kunna keypa tey – ikki bert tey, sum longu eru í vinnuni.

Í stuttum verður mælt til at seta fylgjandi tiltøk í verk viðvíkjandi varandi, positivari tilfeingisrentu og viðvíkjandi tí at gera sum minst skaða á umhvørvið:

- Allar beinleiðis studningsskipanir skulu minka áhaldandi
- Munandi størri fíggjarlig orka skal vera tøk til gransking og fiskirannsóknir, og vinnan er beinleiðis við í at fáa hesa orku til vegar
- Fiskirannsóknir og gransking skulu vera natúrligur partur av vanligum fiskiskapi
- Lógargrundarlag skal tryggja, at vinnan útflýggjar myndugleikum tilfar, ið kann styrkja um upplýsingartilfar til stovnsmetingar og um veiðiorku
- Sett verður í verk nýggj skipan fyri sølu av fiskirættindum, sum skal tryggja betri atgongd og betri framleiðni

Sum nevnt í inngangnum, verður tilfeingið allýst sum landsins ogn. Rættindini til at gagnnýta hesa ogn verða tó seld privatum eftir skipaðum leisti. Endamálið við slíkari sølu er, at vinningur, sum hoyrir beinleiðis til rættindini (fiskiloyvini) skal verða latin eigaranum, t.e. landinum. Hesin vinningur verður í hesum føri nevndur tilfeingisrenta, sum harvið eisini verður inntøka landsins.

Skotið verður upp, at inntøka landsins skal verða beinleiðis knýtt at tilfeingsrentuni í vinnuni. Hetta merkir, at tá ið tilfeingisrentan er høg, verður marknaðarprísurin fyri rættindi høgur og harvið eisini inntøka landsins. Tá ið tilfeingisrentan er lítil ella kanska negativ, minkar inntøka landsins samsvarandi, tí hon er beinleiðis knýtt at henni. Tað er tó sera umráðandi, at handilin við rættindum er opin, sjálvt um inntøkan til landið er avmarkað, tí landið skal laga seg til marknaðarkrøvini, eisini í ringum búskapartíðum.

Strategibólkurin metir, at nevnda skipan er betri enn aðrir møguleikar so sum avgjøld, skattir ella serskattaskipanir, tá ið skip ella rættindi skifta eigara.

Størsti vansin við avgjøldum er, at støður kunnu vera, har støddin á avgjøldum ikki samsvarar við marknaðarstøðuna í vinnuni ella ikki flytur seg samsvarandi broytingum í búskaparligu støðuni. Harnæst verður eitt avgjald altíð ein metingarspurningur hjá myndugleikanum um, hvat er rætt og rímiligt, og varandi ósemjur um hetta føra til, at vinnan fær kenslu av óstøðugum kørmum.

Grundreglan við eini skattaskipan er, at hon – eins og avgjøld – er ein politiskur metingarspurningur. Júst í hesum spurningi er hugsjónarliga gjógvin sera stór millum politiskar flokkar, og illa er hugsandi, at stórvegis varandi semjur fáast um, hvussu stórur ein skattur skal vera. Hetta skapar harvið eisini óstøðugar umstøður eins og í døminum um avgjøld.

Ein vandi við serskattaskipan í sambandi við sølu av veiðirættindum er, at mangan er sera torført at staðfesta, hvussu nógv fiskirættindini telja í einum handli. Vanliga er, at partabrøv í feløgum verða seld antin í eini heild ella sum partur av størri eind. Hesi feløg eiga tíðum ymisk aktiv, ið kunnu vera annað enn fiskirættindi, til dømis skip og kanska partabrøv í øðrum fyritøkum. Er ynski um serskattaskipan fyri fiskirættindi, so verður krav til roknskaparligt gjøgnumskygni sera stórt, og *sporførið* av vinninginum í øllum handlum ein fyritreyt. Hetta merkir, at staðfestast skal, hvussu stórur partur av vinninginum stavar frá

sjálvum fiskirættindunum samanborið við allar aðrar ognir. Hetta verður altíð ein metingarspurningur, og kjakast kann verða um, hvørt rættleiki og rættvísi eru í tí.

Samanumtikið verður tí skotið upp, at:

- skipan verður sett í verk, sum hevur við sær regluliga sølu av rættindum. Slík skipan tryggjar landinum bestu inntøkurnar, og støddin á somu inntøkum er beinleiðis knýtt at tilfeingisrentuni.

Tað er sannroynd, at føroyska fiskivinnan er skipað í sera ymiskar vinnubólkar, bæði í stødd og virkishátti. Tískil kann hugsast, at torført verður at nýta eina og somu skipan fyri fiskirættindi í øllum bólkum. Dømi um hetta eru bólkar við fáum skipum – kanska bert einum, ella bólkar, har almenn semja er um, at rættast er at skipa rættindini øðrvísi enn við fríari sølu. Høvuðsreglan er tó, at innførd verður ein skipan, ið samsvarar nevndu niðurstøðu.

### 3.3. Tilfeingið skal verða umsitið soleiðis, at vit varðveita endurnýggjandi tilfeingið og skaða umhvørvið sum minst

Sum nevnt, er ein hyggjan við nevndu tiltøkum at fáa sum mest burtur úr fiski- og framleiðsluorkuni. Hetta er tó ikki einasta endamálið, tí øll hesi tiltøk eru eisini neyðug og stimbrandi, tá ið ræður um at fara væl við endurnýggjandi tilfeinginum og umhvørvinum. Ein betri samanrenning millum gransking, rannsóknir og vinnuligt virksemi, betri kostnaðartillaging og studningsfrí vinna, eru øll tiltøk, sum beinleiðis eru til gagns fyri umhvørvið.

# 4. Kolvetni

## 4.1. Verandi skipan

Verandi skipan til at umsita oljutilfeingið er í høvuðsheitum tvíbýtt. Annar parturin viðvíkir tillutan av leiti- og framleiðsluloyvum, hin viðvíkir innheintan av tilfeingisrentu.

### Tillutan av loyvum

Loyvi verða tillutað tí samtaki av feløgum, ið Jarðfeingi heldur kunna leita eftir kolvetni í Føroyum á skilabesta hátt. Hetta kann minna um eitt slag av sýning, har feløgini skulu vísa á, at tey hava fólk við røttum førleikum og royndum at leita eftir kolvetni í økjum sum tí føroyska.

Samtøkini hava síðan møguleika at binda seg til:

- Eina arbeiðsætlan, sum kann fata um eina ella fleiri royndarboringar umframt seismikk, alt eftir, hvat samtakið heldur geva bestu upplýsingar um økið.
- At lata pening til vinnuliga førleikamenning í Føroyum. Hetta hongur saman við kravinum frá Jarðfeingi um at nýta sum mest av føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum veitarum, tó at tey skulu vera kappingarfør. Í flestu førum hava føroysk feløg ikki førleika til at veita oljuvinnuni vørur og tænastur, og tí skal oljuvinnan

hjálpa teimum at fáa førleikarnar og síðan nýta hesi feløg, tá ið tey eru ment so mikið.

- At lata jarðfrøðigransking pening gjøgnum Sindri (Future Explorations Programme). Henda gransking er ikki beinleiðis knýtt at einstøku loyvunum, men kann betra um vitanina um alt tað føroyska økið og harvið vaksa um virðið á øllum økinum.
- At nýta føroyska arbeiðsmegi ella feløg, tá ið tey eru kappingarfør.

Verður roknað við, at øll samtøkini, ið søkja, hava førleika til at gjøgnumføra eina leitiætlan, so er týdningarmesti parameturin í hesum tilboði, hvørja arbeiðsætlan tey bjóða sær til at gjøgnumføra, við tað at ein leitibrunnur um hesar leiðir helst kann kosta einar 400 mió. kr. Sostatt tryggjar ein sær, at tað felag, sum sær størstu møguleikar í økinum, og sum bindur seg til at leggja tilsvarandi orku í leitingina, fær loyvið at leita.

Hetta samtak fær einarætt at leita eftir og framleiða kolvetni á hesum ávísa øki, sum loyvið fevnir um. Loyvini kunnu galda í styttri ella longri tíð, alt eftir, hvat Jarðfeingi metir vera hóskandi. Higartil hevur talan verið um 1-9 ára loyvi.

## 4.2. Hvørji tiltøk kann tað almenna seta í verk fyri at fáa betri framleidni í oljuvinnuni?

Fyri at fáa gott framleidni í vinnuna, er umráðandi, at føroysku myndugleikarnir ikki leggja óneyðugar útreiðslur á vinnuna. Í øllum førum eru øktar útreiðslur við til at minka um tilfeingisrentuna. Sum dømi kann nevnast, at vinnuni er álagt at skipa allan vøru- og persónsflutning um føroyska bryggju ella flogvøll.

Í høvuðsheitum er virksemið hjá vinnuni ikki hindrað av almennum átøkum, og framleidni í vinnuni verður ikki darvað.

Felagsskapurin hjá oljufeløgunum, Føroya Oljuídnaðarbólkur, hevur fleiri ferðir sagt seg vera væl nøgdan við, hvussu føroyska oljuvinnan hevur verið skipað higartil, hóast tað altíð eru onkur øki, har vinna og myndugleikar eru ósamd. At útlendingar eisini halda føroysku myndugleikarnar hava megnað uppgávuna væl, sæst av, at Heimsbankin hevur heitt á Føroyar um at hjálpa Palauoyggjum at skipa eina møguliga oljuvinnu har.

## Innheinting av tilfeingisrentu

Finnur eitt samtak av feløgum kolvetni innan fyri loyvi sítt, hevur samtakið rætt til at framleiða kolvetnið og eigur inntøkuna frá søluni av hesum kolvetnum.

Til at innheinta tilfeingisrentuna hevur Landsstýrið í 1999-2000 sett í verk eina oljuskatta-skipan. Skipanin inniheldur hesar partar:

Framleiðsluavgjald (royalty) á 2% av virðinum. Her verða rindað 2% av framleiðsluvirð-inum, tá ið kolvetnið kemur í land.

Vanligur kolvetnisskattur (partafelagsskattur) á 28%. Her verða rindað 28% av netto-inntøkuni, eftir at útreiðslur og framleiðsluavgjald eru frádrigin.

Serligur kolvetnisskattur (serskattur) í trimum stigum upp til 40%. Her verða rindað 10, 25 ella 40% alt eftir, hvussu stóran vinning tað einstaka oljuøkið kastar av sær.

Víddargjald skal eisini latast fyri økið, sum fevnt er av loyvinum. Fyrstu seks árini rinda oljufeløgini 500 kr. fyri ferkilometurin um árið, og síðan hækkar hetta stigvíst upp til 39.000 kr fyri ferkilometurin um árið eftir sekstan árum. Til ta tíð kann tó roknast við, at oljufeløgini hava latið frá sær mest sum alt økið, sum ikki er framleiðsluøki.

Telja vit nú saman, kann eitt oljufelag rinda upp til 57% í skatti og avgjøldum av vinningi-num. Feløgini verða – tá ið framleiðslugjaldið á 2% er frá – ikki skattað, áðrenn tey hava vinning, og tí er eitt ávíst váðabýti millum land og feløg bygt inn í skipanina.

Skipanin er progressiv (úr uml. 30% upp í 57%), og hevur ein ávísan smidleika. Tískil skuldi ikki verið neyðugt at broytt skipanina, so hvørt sum fortreytir sum t.d. oljuprísur, útbyggingarkostnaðir og tílíkt broytist.

## 4.3. Hvørji tiltøk kann tað almenna seta í verk fyri at tryggja landinum bestu inntøku av oljuvinnuni?

Vit mugu vera greið um, at enn hava vit ikki fingið staðfest olju í rakstrarverdum nøgdum í føroyskum øki. Tí er heldur ikki víst, at nøkur tilfeingisrenta yvirhøvur er í føroyskum kolvetni. Vit skulu eisini vita, at føroyska økið er eitt serváganarøki (high risk øki), og at vanligt er, at íløgur í serváganarøki skulu kunna geva nógvan vinning fyri at vera áhugaverdar. Vit eiga tí at eftirkanna, um nóg nógvur vinningur er í føroyskum øki, eftir at feløgini hava rindað vanligan kolvetnisskatt, framleiðsluavgjald, serskatt, víddargjald o.s.fr.

Seinastu tíðina, nú ið fimti brunnurin eisini var tómur, tykist áhugin fyri økinum at hava fingið eitt bakkast. Eisini kann sigast, at áhugin undan brugduboringini hevur heldur ikki verið so stórur, tí fimm brunnar í fimm ár boðar ikki júst frá ovurstórum áhuga.

Væntaða tilfeingisrentan, um vit hyggja fram til 2015 og longri, er beinleiðis knýtt at áhuganum fyri økinum, og tí er týdningarmikið at vaksa um henda áhuga. Hetta gerst t.d. við at geva feløgunum størri vinningsmøguleikar, um tey finna olju.

### Fíggjarlig tiltøk

Sum nevnt, kann spurnartekn setast við, um verandi skipan tekur ov stóran bita av køkuni og letur feløgunum ov lítið afturfyri tann váða, tey taka á seg, tá hugsað verður um, at framleiðsluskeiðið ikki er byrjað enn. Nøkur hugskot kundu tí verið at broytt kolvetnisskattin til vanligan partafelagsskatt og kanska eisini lækka serskattasatsin, hækka markið fyri, nær serskattur skal gjaldast og at taka framleiðslugjaldið av.

### Ikki-fíggjarlig tiltøk

Aðrir tættir, ið ikki beinleiðis ávirka býtið av tilfeingisrentuni, men sum hava stóran psykologiskan týdning, er áhaldandi at endurskoða allar reglur fyri at tryggja sær, at reglur í føroyskum øki sum heild eru líka sum í øðrum leiti- og framleiðsluøkjum, vit kappast við.

Annað tiltak, sum kundi ávirkað hugburðin hjá feløgunum og áhugan fyri at leita í Føroyum, uttan at tað kostaði nakað stórvegis, kundi verið at broytt ásetingina um, at alt tilfar og fólk skal um føroyska bryggju ella flogvøll. Tað hevði minkað um kostnaðin at leita í Føroyum og hevði soleiðis havt góða ávirkan á væntaðu tilfeingisrentuna.

### 4.4. Tilfeingið skal verða umsitið soleiðis, at vit varðveita endurnýggjandi tilfeingið og skaða umhvørvið sum minst

Til tess at verja umhvørvið og ikki at oyða annað tilfeingi sum eitt nú fisk, eru krøvini til umhvørvisverju sera strong fyri oljuvinnuna. Tó kann munur vera á reglunum í ymsu londunum. Her kundu vit kanska hugt at Bretlandi heldur enn Noregi, tó uttan at hetta á nakran hátt setir umhvørvið í váða.

Leggjast skal tó av øllum í geyma, at eingin kolvetnisskipan hjálpir, um eingin olja er.

## 5. Alivinna

### 5.1. Verandi skipan

Vinna og myndugleiki hava í felag lagt stóra orku í arbeiðið at gera skipaðar felagsreglur fyri øll aliøki í Føroyum, har hesi øki verða tulkað sum ein og sama eind.

Týðandi partar av hesum reglum eru lýstir niðanfyri:

Skal alitilfeingið geva hægst møguligt avkast yvir tíð, skulu aliøkini framhaldandi stýrast við aliloyvum og økishvíld.

25 aliøki eru í Føroyum. Aliøkini eru sostatt avmarkað og hava eitt virði. Á hesum økjum kunnu alarar bert seta ein árgang út í senn, sum teir síðan ala fram til tøku. Áðrenn sett verður út aftur á sama øki, skal tað hvíla ávísa tíð.

Eingin áseting er fyri, hvussu nógv, ið alast kann. Nøgdaravmarking er kanska óneyðug, av tí at alarar skulu lata øki hvíla millum útsetingar, til lívfrøðilig javnvág aftur er.

### 5.2. Alivinnan skal hava so stórt framleidni og samfelagsbúskaparligt yvirskot, sum til ber

Alipolitikkurin eigur ikki at viðgera, hvussu stóra nøgd eitt aliøki kann bera, men bert staðfesta, at eitt ávíst tal av aliøkjum eru allýst. Uppgávan hjá bygnaðarpolitikkinum er heldur at skapa karmar fyri, at allýstu aliøkini geva sum mest av sær.

Framleidnastu fyritøkurnar skulu kunna umsita aliøkini.

Strategibólkurin heldur, at nevndu reglur eru góðar og skapa grundarlag fyri menning fram ímóti 2015. Politiska avbjóðingin fram ímóti 2015 verður tískil at tryggja, at hesar reglur støðugt verða mentar, samstundis sum sjálvt grundarlagið ikki verður broytt. Týdningarmikið er at síggja fyrimunin í at hava fáar fyritøkur, sjálvt um hetta stendur í andsøgn við fría atgongd, og at pláss verður fyri bæði smáum og stórum fyritøkum. Hugsast kann, at myndugleikin kann koma undir trýst av hesum, og tá er sera umráðandi ikki at víkja frá tí stýring, sum er grundað á ein heildarpolitikk. Ein týðandi partur av menningini í førda alipolitikkinum er at geva rúm fyri tøkniligari menning, ið kann økja um samlaða aliøkið, so at eisini kann alast aðrastaðni enn á firðum og sundum.

## 5.3. Landinum verður tryggjað eina so góða tilfeingisinntøku, sum til ber

Bygnaðarliga verður mett, at í framtíðini verður alivinnan skipað munandi øðrvísi enn eitt nú fiskivinnan. Orsøkin til hetta er, at stórur partur av nevndu aliøkjum verður skipaður í somu feløg, sum harvið verða fá í tali. Longu nú síggja vit eitt mynstur, ið er grundað á, at 4-6 alifeløg umsita alla alingina í Føroyum. Hetta mynstrið verður tað sama í 2015, ella helst verða feløgini færri. Tí er ikki at vænta, at ein virkin marknaður við aliloyvum kann byggjast upp á sama hátt sum í fiskivinnuni, har 150-200 fiskiloyvi eru til størri skip og kanska 1.000 til útróðrarbátar. Í alivinnuni kann væntast, at ov fáir alarar bjóða upp á alitilfeingið, og hetta kann hava við sær, at kappingin ikki virkar.

Alivinnan verður ein munandi meira konsentrerað vinna, og feløgini, ið umboða hana, fara at líkjast hvør øðrum nógv meiri enn tey í fiskivinnuni. Sum fyrr nevnt, eru nógvir fyrimunir í at skipa fleiri loyvi í fá feløg. Til ber til dømis at hava skipaða útseting við *einum* árgangi á hvørjum øki, og til ber eisini at hava fasta skipan, ið tryggjar, at tað altíð eru øki, ið ikki verða nýtt til aling. Stuttfreistað søla av aliloyvum stendur í andsøgn við skynsaman alipolitikk, fiskasjúkupolitikk og umhvørvispolitikk, og hesum skal ein hava fyrilit fyri.

Sjálvur aliparturin í einstøku feløgunum verður eisini sera líkur samanborið við fiskivinnuna, sum er sera ymisk. Tí verður tað ikki hildið at vera avlagandi, at sama allýsingarregla um roknskaparligan vinning fer at galda fyri allar fyritøkurnar, og tekniskt ber til at spora, hvat sjálv alingin, ið er grundað á almenn loyvi, kastar av sær. Henda roknskaparliga mannagongd verður longu nýtt í dag.

Av nevndu orsøkum verður mælt til, at landsins inntøkur verða ásettar við tilfeingisskatti, sum beinleiðis verður knýttur at tilfeingisrentu, ið er allýst sum vinningur út yvir vanliga vinningin.

Alitilfeingið skal troytast á besta hátt yvir tíð, soleiðis at sum mest av virðinum kemur samfelagnum til góðar. Hetta verður tryggjað við so høgari tilfeingisrentu, sum til ber. Býtið av hesi rentu millum tann vinnurekandi og landið verður ásett við tilfeingisskatti

Fyritøkur, sum fara at umsita aliøkini, kunnu vera altjóða alifeløg.

Samandrátturin um aling og Visjón 2015 verður tískil, at:

- fast verður hildið um skipanina við aliloyvum, økishvíld og skilnaði millum aliárgangir
- av nevndu orsøk er fyrimunur at skipa fleiri loyvi í fá feløg
- krevjast skal tilfeingisskattur, sum hevur fyrilit fyri, at kappingin um framleiðslumiðlarnar verður javnsett, og at framleidnastu fyritøkurnar umsita alitilfeingið
- aliloyvi skal galda eitt ávíst, langt áramál
- granskingararbeiði verður natúrligari partur av framtíðar alifyritøkum
- samlaða aliøkið fer at fevna um annað enn bert firðir og sund
- núverandi skipan við altjóða atgongd verður eisini galdandi í 2015.

### 5.4. Tilfeingið verður framhaldandi umsitið við atliti at umhvørvi og fiskasjúkum

Kappingin um aliloyvini verður tvíbýtt, har ein partur er grundaður á kapital, og hin á førleika og evni at halda krøv og treytir, ið myndugleikin lýsir sum sjálvsagdan part av einum loyvi. Ein sera avgerandi lutur í seinnu metingini verða evnini hjá einstaka felagnum at ansa eftir umhvørvinum og fiskasjúkum, og hvussu virkið tað er í granskingararbeiði, sum eigur at vera natúrligari partur at allari vinnu í 2015.

Samanumtikið kann sigast, at:

- ikki bert kapitalur ger av, hvørjum loyvið verður selt, men eisini førleiki og evni at ansa eftir umhvørvinum og fiskasjúkum
- fleiri loyvi í fáum feløgum skulu eisini geva feløgunum betri møguleikar at ansa eftir nevndu viðurskiftum.

## 6. Landsjørð

### 6.1. Verandi skipan

Landbúnaðarjørðin í Føroyum er skipað í óðalsjørð, kongsjørð og prestjørð. Óðalsjørð er privat og kann keypast og seljast frítt. Kongsjørð og prestjørð eru tað, vit vanliga nevna landsjørð ella festijørð, og verða umsitnar av Búnaðarstovuni.

Almenni landbúnaðarpolitikkurin miðar eftir, at:

- Framleidnið (framleiðsluorkan) í landbúnaðinum gerst betri
- Føroyar gerast so sjálvbjargnar við landbúnaðarvørum, sum til ber
- Øll landbúnaðarjørð verður gagnnýtt
- Ognarviðurskiftini á gørðunum verða endurskoðað
- Landbúnaðarvinnan skal gerast sjálvberandi

**Framleiðsla**

Høvuðsframleiðslan í føroyskum landbúnaði er:

- Mjólkarvøra
- Seyðakjøt
- Onnur framleiðsla (neytakjøt, ull og egg)

Mjólkin er størsta inntøkukelda hjá einum festara. Fyri nøkrum árum síðan vórðu mjólkarkvotur settar á framleiðsluna, og seinni bar til at selja og keypa hesar kvotur. Kvoturnar hava einki við politiska myndugleikan at gera, men eru ásettar av bóndunum sjálvum. At høvi er at keypa og selja tær hevur gjørt, at vit hava fingið færri mjólkarbøndur. Teir, ið hava keypt meiri kvotu, hava ikki ansað nóg væl eftir, at umstøðurnar til at vaksa eru ikki nóg góðar.

**Festiviðurskiftini**

Í dag eru um 400 festi, ymisk til støddar. Fyri at fáa festi skal ein lúka krøv um útbúgving og vinnuroyndir. Festari kann sita við festi, til hann vil leggja frá sær, ella til hann er 70 ára gamalur. Hevur hann børn, ið lúka ásetingarnar í lógini, hava tey framíhjárætt til festið. Um ikki, skal tað lýsast leyst. Festari kann eisini missa festi sítt av misrøkt.

## 6.2. Hvat kann gerast fyri at fáa størri framleidni í landbúnaðinum?

Núverandi gongd, har vinnan verður skipað í stórar eindir, heldur støðugt fram, eisini í 2015. Hetta verður ikki bert galdandi fyri mjólkarbøndur, men eisini fyri seyðabøndur. Keyp og søla heldur fram, ikki einans við festibrøvum. Lóggáva á økinum skal ikki forða fyri hesi gongd.

Skipað verður so fyri, at góðar umstøður eru at hava mjólkarfjós, har samsvar er millum kvotu, fjós, køst og bø. Bøurin hevur nógv mest at siga fyri lønsemið. Umráðandi er, at tann útbygging, sum nú má koma, verður gjørd á skilagóðan hátt.

Lóggáva skal tryggja, at bøndurnir sjálvir eiga garðarnar og hava ábyrgdina av teimum. Nú er støðan hon, at alt tað ólønta arbeiði, sum bóndin og familja hansara leggja í jørðina, kemur tí almenna til góðar. Við fjósum er støðan tann sama.

Aðrir karmar skulu eggja til, at hagarnir ikki verða skiftir meiri sundur. Heldur skal virkast fyri at fáa lagt hagar samanaftur. Fleiri eigarar, fleiri stik, fleiri rættir og fleiri vegir økja ikki á nakran hátt um framleidnið – heldur hinvegin. Umráðandi er, at eigararnir fáa ábyrgd av at røkja seyðin alt árið.

Arbeiðast skal fyri, at fólk betur kann fáa nyttu av bønum. Bøurin er alt ov nógv knýttur at høgunum, sum eiga vetrarbitið. Tørvur er á neyvari skipan, sum tryggjar, at seyður, ið gongur í høgunum á sumri, verður røktaður samsvarandi teir sjey mánaðirnar, hann er á bønum. Hetta kann gera, at torført verður at fáa fullgóða nyttu hjá tí, sum eigur bøin.Mangan hava hagarnir lítla nyttu av bønum, tí hava teir gott vetrarbit, verður bara vaksið tilsvarandi um skipanina. (Hetta er mest galdandi fyri óðalsjørð).

Gransking og ráðgeving verður ment munandi fram til 2015, og samstarv við grannalond okkara verður styrkt. Royndir og gransking verða skipaðar við altjóða leiðslubólki, t.d. við umboðum úr grannalondunum.

Mjólkarbøndurnir gerast alt færri, og óivað verður hetta lagið fram til 2015. Tølini niðanfyri siga frá, hvussu gongdin verður mett at vera:

| | |
|---|---|
| 1985: | 105 |
| 2005: | 65 |
| 2015: | 20 |

Mjólkarframleiðslan verður tó neyvan minni í 2015 enn nú – heldur størri. Hvørt fjósið fer at framleiða nógv meiri mjólk, í miðal 300.000 litrar um árið ella meiri, og framleidnið fyri hvørja eind verður tí munandi betri. Tøknilig menning skal eisini tryggja sera dygdargóðar úrdráttir. Á hendan hátt skapa vit partar av grundarlagnum fyri visjónini, nevniliga eina sjálvberandi vinnu, ið ger vørur til heimamarknaðin, har *dygd* er vørumerkið, ið skal bera kappingarførinum.

Sama gongd sum í mjólkarframleiðsluni skal eisini tryggja vinnuliga framgongd á øðrum økjum, samstundis sum vinnan kann skipast saman við øðrum vinnugreinum.

Lógarverkið skal tryggja, at møguligar forðingar fyri hesi gongd verða tiknar burtur, til dømis krøv um spjaðing og bústaðarskyldur.

Jørð og vinna, ið er beinleiðis grundað á hana, hava ikki stórvegis týdning fyri føroyskan búskap í 2015, um samanborið verður við búskapin í síni heild. Kortini er sannlíkt, at heimamarknaður verður fyri landbúnaðarvørum – eisini í 2015, og teir vinnumøguleikar, ið kunnu grundast á hetta, samantvinnað við annað virksemi, skulu mennast og troytast, sjálvt um teir vera sera avmarkaðir í samlaðu búskaparmyndini.

Eins og nú verður heimamarknaðurin mest týðandi grundarsteinur fyri landbúnaðin í 2015, og serføroyskar vørur verða gjørdar til henda marknað.

## 6.3. Hvat kann tryggja, at búskaparliga yvirskotið av landbúnaðinum er sum best, og at landinum verður tryggjað eina so góða tilfeingisinntøku, sum til ber

Neyvan verður avlopið so stórt hjá vanligum bóndum og jarðareigarum í Føroyum, at teir hava til nógv annað enn lønir og nýggjar íløgur.

Verða festini einskild ogn hjá bóndunum, eigur tilfeingisgjald at verða goldið í Búnaðargrunnin ella annan grunn fyri jørð, sum verður seld til almenn endamál, t.d. til bygging.

Allir festibøndur gjalda leigu í dag – millum 1,00 og 700,00 kr. Leigan varð ásett í 1899 og hevur verið galdandi síðan.

Kunnleikin um landbúnað skal eisini styrkjast, m.a. við at fáa útbúnar lærarar at standa fyri skipaðari undirvísing og útbúgving á verandi skúlum.

Royndarstøðin skal eisini styrkjast, so at hon kann gerast ein granskingar- og vitanardepil hjá føroyskum landbúnaði sum heild.

Gerast kann eisini ein nýggj djóraverndarlóg, sum skal kunna fevna um seyð í haga. Hetta kundi verið gjørt við at seta ávísar reglur í gildi eftir nøkrum árum.

## 6.4. Tilfeingið skal verða umsitið soleiðis, at vit varðveita endurnýggjandi tilfeingið og skaða umhvørvið sum minst

Ein framtíðar landbúnaðarlóg verður galdandi fyri alla jørð. Lógin setir almenn krøv um eigaraviðurskifti, útbúgvingarkrøv, um hvussu jørðin skal røkjast og annað. Landbúnaðarlógin skal lýsa, hvussu landbúnaðarlendi skulu nýtast, hava ásetingar um nýtsluhátt, sum skaðar náttúruna sum minst, seta krøv um loyvi frá friðingarmyndugleikunum til at kunna gera stór inntriv í náttúruna, t.d. at turrleggja mýrulendi, velta í haganum, taka flag/jørð til onnur endamál og so frameftir.